# Skúlabyrjan í studentaskúlanum á Kambsdali

Mikudagin í seinastu viku byrjaðu studentaskúlin og HF. skeiðið á Kambsdali. Í dag eru 267 næmingar á skúlanum, og tað eru átta færri enn fyri summarfrítíðina. Okkurt er broytt í tímatalvuni á skúlanum. Tímatalvan er nú býtt í blokkar, hvør á 90 minuttir. Tað hevur við sær, at tímatalvurnar nú eru galdandi í tvær vikur í mun til eina, sum var vanligt, Annanhvønn fríggjadag er eitt hol, tá allur skúlin hevur frí. Ætlanin er, at hesin blokkur skal nýtast at betra um tað sosiala á skúlanum og til gestir uttanífrá. Skúlin hevur skipað eina holnevnd, og hon skal, í samstarvið við næmingunum, skipa fyri, hvat skal henda í holinum.



# lygn




*Muhammed og Rafik Bourbia framman fyri pizzabúðini Rafiksa í Runavík og við bilin, har passini vóru goymd*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Teir eru aftur so góðir vinir, sum teir plagdu at vera. Hendingin, sum fyribils hevur kostað Rafik fýra mánaðir í fongsli, er nú gloymd*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir at Muhammed Bourbia kom heim aftur til Føroya fyri góðari viku síðani, hevur hann verið hjá løgregluni og hjá sakføraranum hjá Rafik Bourbia og boðað teimum frá, at tað er systkinabarnið, sum hevur íspunnið hesa søguna. Meðan Bjørn á Heygum er fegin um hetta óvæntaða vitnið til landsrættin, so hevur løgreglan boðað frá, at málið ikki longur hvílir í teirra hondum.

- So eg má bíðað, til málið kemur fyri í Eystara landsrætti, áðrenn eg kann siga ákæruvaldinum sum er, sigur Muhammed Bourbia.

Teir báðir ungu vóru annars ikki til staðar í rættinum, tá sakin móti Rafik Bourbia og bróðuri hansara fór fram, men teir vóru avhoyrdir framman undan. So skjótt sum hetta var gjørt, fóru teir til Tunesia. Men sum skiltist á lagnum hendan dagin í rættinum, so høvdu verjarnir havt møguleika at tráðspurt Muhammed og Tallell.

## Nógvan ágang

Tá Sosialurin vitjaði seinnapartin í gjár kundi tað ikki umgangast, at vit løgdu til merkis tvey brot í rútinum á úthurðini.

- Soleiðis er tað, rúturin er steinaður inn. Her verður brotið inn í heilum, og tí goyma vit einki av virði inni her, sigur Rafik Bourbia.

Og millum virðini eru passini hjá teimum.

- Tallell segði, at Rafik hevði stolið passini hjá okkum, tá hann ringdi til mín hendan morgunin í juli. Seinni niðri í Tunesia segði hann mær, at tað passaði ikki, og at hann sjálvur hevði givið Rafik passini. Hetta var vanligt, tí vísum er ógvuliga trupult og umstendiligt at fáa í Tunesia, og tí er tað vanligt, at Rafik hevur passini hjá okkum, sigur Muhammed Bourbia.

Rafik Bourbia vísir eisini á, eins og hann gjørdi í rættinum, at tá hann goymdi passini í bilinum, so var tað eingin loyna sum so.

- Teir høvdu jú lykilin til bilin, sigur Rafik Bourbia, sum vísir á, at tað ikki bert vóru passini hjá Muhammed og Tallell sum vóru goymd har, men eisini passini hjá sær sjálvum og bróðrinum.

Hann sigur seg annars hava kent nógvan ágang, og umframt innbrotini er eldur eisini einaferð settur á pizzabúðina hjá honum.

Hinvegin undirstrikar hann umaftur og umaftur, at tað ikki er hann, sum hevur lokkað Muhammed Bourbia til Føroya aftur, men at tað útilokandi er Muhammed sjálvur, sum hevur tikið ta avgerðina.

Muhammed Bourbia vil hava fram í ljósmála tað mistakið, sum hann heldur er gjørt, og tá hann nú er til reiðar at vitna »móti sær sjálvum« í landsrættinum, so kann bara gitast um úrslitið.

Í hvussu er kann staðfestast, at Muhammed Bourbia er aftur í Føroyum, býr inni hjá Rafik og hevur tikið arbeiðið sum pizzakokkur í Rafiksa upp aftur.